Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Leið 400 hjá Standferðsluni

Spurningar:

1) Hevur landsstýrismaðurin kannað, hvør grundgevingin er fyri, at SSL velur at økja túratalið úr Klaksvík gjøgnum Eysturoyartunnilin og til Havnar úr eina ferð til tvær ferðir um dagin, heldur enn at brúka tey uppskot til broytta ferðaætlan, ið borgarar hava sent inn til stovnin?
2) Heldur landsstýrismaðurin broyttu ferðaætlanina vera nøktandi?
3) Kann landsstýrismaðurin vátta, at tær umleið 2 mió. kr., ið Løgtingið júst hevur játtað til hesa farleið, verða brúktar til endamálið?

Viðmerkingar:
Eftir at Strandfaraskip Landsins hevur broytt ferðaætlan í sambandi við, at Eysturoyartunnilin lat upp, hava fleiri borgarar í Norðoyggjum og Eysturoynni víst á, at leiðin millum Klaksvík og Havnina (leið 400) broyttist til tað verra. 87 borgarar sendu inn hoyringarskriv um ætlaðu broytingarnar um *ein* túr um dagin gjøgnum Eysturoyartunnilin.

Løgtingið hevur júst játtað umleið 2 mió. kr. í eykajáttan til júst somu farleið, við tí endamáli at tað skuldi gerast smidligari at ferðast millum økini við almennari ferðslu. Nú nýggj ferðaætlan enn eina ferð er gjørd sæst, at túratalið um morgunin bara er økt við einum einkultum túri úr Klaksvík til Havnar, og einum túri seinnapart úr Havn til Klaksvíkar. Fyri tey, ið arbeiða norðanfyri, er framvegis bara ein túrur á morgni. Ynskja fólk at ferðast millum Havn og Klaksvík aðrar tíðir gjøgnum Eysturoyartunnilin, noyðast tey ikki bara at skifta buss eina ferð, men tvær ferðir.

Leið 400 hevur higartil verið tann leiðin, ið hevur flutt nógv flest ferðafólk. Við broyttu ferðaætlanini er vandi fyri, at munandi færri ferðandi fara at brúka leiðina, og tí vil undirritaða hava at vita, um landsstýrismaðurin heldur, at hesar broytingar eru á einum nøktandi tænastustøði fyri almennan ferðafólkaflutning.

Á Løgtingi, 5. mai 2021

Eyðgunn Samuelsen